# Seksti ár eru liðin

FÓLKAATKVØÐAN

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú seksti ár eru liðin, síðan føroyingar á fólkaatkvøðu, 14. september í 1946, atkvøddu um stjórnarupp-skot øðrumegin og loysing hinumegin, hava tjóðveld-isfeløg kring landið gjørt burtur úr degnum.

Eini 100 fólk vóru til tiltakið í EB-húsinum á Eiði síðsta hóskvøld við fyrilestri, røðum, frá-sagnum, fólkasangi og felagssangi.

Tiltakið vardi í tríggjar tímar. Sosialurin var við til tiltakið, bæði við tíðinda-manni og myndamanni.

Vit fara at taka burtur úr ymiskum av tí, sum borið varð fram, og vit fara eisini at prenta fleiri myndir.

Umframt tilfarið, sum vit hava á hesum báðum síðunum í dag, hava vit tað, sum Annfinnur í Skála, søgufrøðingur og Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, søgdu, enn til góðar.

Tjóðveldisfeløgini, sum skipaðu fyri tiltakinum, høvdu boðið Edmundi Joensen, løgtingsmanni og løgtingsformanni, við, og tað er einki at taka seg aftur í, at hann setti sín dám á løtuna.

Tað var Annfinnur í Skála, søgufrøðingur, sum legði fyri, og hann greiddi frá støðuni í Føroyum undan, undir og eftir fólkaatkvøðuna í 1946. Annfinnur samanbar eisini støðuna í 1946 við støðuna síðst í nítiárunum, tá ið føroyingar aftur fóru undir fyrireikingar til samráðingar við danir um fullveldi.

Tórbjørn Jacobsen, løg-tingsmaður, helt, at tá ið frælsishugsjónin ikki longu er jarðløgd í Føroyum, so verður hon tað ongantíð.

– Kanska hevur føroy-ingurin bara havt politiskt krím hesi seksti árini – og er við at koma fyri seg aft-ur, segði hann.





Olaf í Garði Joensen:

# Tað rak hart á k

**– Hvat hendi fyri seksti árum síðan her í Føroyum. Jú, sera nógv. Hetta árið vóru nógv, sum sóu ljós fyri fyrstu ferð, nógv søgdu farvæl fyri síðani at vera fjald undir moldum. Har, ið hendur sleptu, tóku aðrar við, segði Olaf í Garði Joensen á 14. Septemberhaldinum á Eiði**

FÓLKAATKVØÐA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Olaf í Garði Joensen, sum er varamaður á listanum hjá Tjóðveldisflokkinum í Eysturoy, helt eisini røðu, tá ið 14. Septemberhald var á Eiði síðsta hóskvøld.

Hann vísti á, at undir fólkaatkvøðuni fyri seksti árum síðan fóru føroyingar í tveir partar.

– Bestu vinmenn fóru næstan í hornatøkur. Teir høvdu sitið á sama bekki og lagt mangan harðan and-róður aftur um.

Olaf segði, at tey, sum vildu hava loysing, løgdu all-ar árar í sjógv; adrenalinið fekk blóðæðrarnar at bólgna.

– Men tað vóru eisini tey, sum fyri ein hvønn prís vildu hava verandi støðu við dønum sum evsta valdi í Føroyum. Hetta var trygdin, tí við hesum vistu tey, hvat tey høvdu, men vistu ikki, hvat tey fingu í staðin.

Hann segði, at hesi fólk meintu tað í rámasta álvara – og speiskliga varð so mót-parturin spurdur, um tað var gott tarapláss á Eiði, Tjørnuvík, Haldarsvík og so framvegis.

– Hetta var maturin, sum føroyingar skuldu liva av, um teir valdu at klára seg sjálvar. Tveir vóru kostirnir, men hvørgin var mjúkur at strúka fyri tey, sum ikki høvdu tikið støðu.

Olaf segði, at á hinari síð-uni søgdu loysingarfólk, at æran stóð upp á spæl.

– Hvørji mundu seinastu orðini vera hjá manninum, sum fall fyri bakka. Mundu tey vera søgd á donskum máli - ella segði hann ikki "Gud hjálpið mær?".

Jú, tað leikaði hart á, vísti hann á.

– "Eg atkvøddi fyri bónd-anum" – ella "Sjálvandi valdi eg lista B". "A stendur fyri Andrass Samuelsen; tí valdi eg A", varð aftursvarið.

Olaf vísti á, at soleiðis vilja summi vera við, at fólk hugsaðu.

– Men kanska er svarið nakað heilt annað, kanska vóru tað tey fáu, sum søgdu sína hjartans meining. Tann tigandi fjøldin segði einki, men tey ivaðust ikki.

Hann segði, at í Hald-arsvík rak rættiliga hart á kíkinum.

– Andrass Samuelsen var jú víkamaður, og væl hevði hann tjóðra síni við-haldsfólk. Bróðurin, Pól, var eins og Andrass, sam-bandsmaður, so tað brakaði eftir í, hittinorðaður var hann, og ikki minst vóru teir fróarmenn.

Olaf segði, at øll í Hardars-vík høvdu kortini ikki somu áskoðan, sum teir báðir.

– Hans Pauli á Bø var loysingarmaður um háls og herðar, keypmaður var hann og tiltikin fyri styrki, hann var annars abbi til tiltiknu listamennirnar, brøðurnar Torbjørn og Hans Paula Olsen.

So kom fólkaatkvøðan.

– Á Eiði atkvøddu 102 fólk fyri stjórnaruppskotinum (samband), 117 atkvøddu fyri loysing, og 16 valdu blankt. Í Haldarsvík valdu 107 samband og 45 valdu loysing, tvær vóru blankar. Fólkið hevði talað.

Olaf segði, at Hans Pauli á Bø og viðhaldsfólk høvdu vunnið, føroyingar høvdu tikið loysing.

– Snarur var Hans Pauli í vendingini. Føroyska Merkið varð vundið í húnar hátt, og tann reyði, hvíti og blái liturin runnu í ástarleik við tí mjúka frælsisvindinum, sum fekk Merkið at veitra.

Olaf segði, at um hetta mundið kom Poul Samuelsen fram við. Hann var á veg út á kaiuna, og so spyr hann Hans Paula, hví hann flaggar?

– Vit hava vunnið svarar Hans Pauli. Tá skuldi Pól svara: "Fanin var eisini glað-ur langafríggjadag, men tað kom ein páskamorgun!" Tá Pól kemur aftur av kaiuni, er Merkið tikið niður hjá Hans Paula á Bø. Alt varð nú til einkis gjørt, sjálvt um ein meiriluti var fyri loysing, segði Olaf í Garði Joensen m.a. í røðu síni.

Edmund Joensen, løgtingsmaður:

# Er einki æti í sjónum er heldur eingin

**Á 14. September-haldinum á Eiði seinasta hóskvøld samanbar løgtings-maður Sambands-floksins, Edmund Joensen, ríkisstuðulin við æti í sjónum.**
**– Eiðisfólk vita, at er nógv æti í sjónum, verður eisini nógvur fiskur, segði hann**

FÓLKAATKVØÐAN

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað vóru tjóðveldisfeløgini í Eysturoy og Norðstreymoy, sum høvdu boðið Edmundi Joensen at vera við til haldið á Eiði, nú seksti ár vóru liðin, síðan føroy-ingar á fólkaatkvøðu høvdu høvi at atkvøða um danskt stjórnaruppskot ella loysing.

Millum tey umleið 100 tjóðveldisfólkini, sum høvdu leitað sær í EB-húsið hetta kvøldið, helt løgtingsmaður Sambandsfloksins fyri, at søgan altíð er áhugaverd, men samstundis er søga eisini afturlítandi.

– Meira áhugavert er at hyggja frameftir og spyrja, hvussu út hevði sæð í Før-oyum, um loysingin hevði verið framd – og um loysing-arfólk høvdu fingið sín vilja í 1946.

Hann helt kortini, at hin allarfyrsti spurningurin í hes-um sambandi átti at verið, hvussu tað í heila tikið ber til at taka slík stig við tvíbýttum føroyingum – helvtin fyri og helvtin ímóti, sum hann tók til.

– Mítt svar er, at hetta hevði ikki borið til. Neyðugt er, at fjøldin av fólki stendur



*– Vit kunnu vera ósamd um politisk mál, men vit mugu altíð finna breiðar semjur um spælireglurnar, segði Edmund Joensen á 14. September-haldinum á Eiði*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

aftanfyri eina slíka avgerð. Skalt tú taka so stórar avgerðir, sum at melda land-ið hjá tær úr einum ríki, krevst, at fjøldin av fólki stendur saman um tað. Er avgerðin framd í verki, vend-ist ikki aftur, segði Edmund Joensen.

Hann legði aftrat, at politik-arar eiga ikki at útnytta, sum hann tók til, eina uppøsta støðu, sum tíðin uppundir fólkaatkvøðuna í 1946 var, eins og bankamálið var tað í nítiárunum.

### Klandrast enn

– Á fólkaatkvøðuni í 1946 høvdu føroyingar tveir val-møguleikar, stjórnarupp-skotið ella loysing. Tveir triðingar av fólkinum vildu ikki hava stjórnaruppskotið, og tveir triðingar vildu ikki hava loysing. So, líka mikið hvør vann fólkaatkvøðuna, gjørdist talan undir ongum umstøðum um eitt úrslit, sum fjøldin av fólki tók und-ir við.

Edmund segði, at summi settu krossin við tað, sum tey vildu hava; onnur settu krossin við tað, sum tey hildu vera tað frægara av tveimum ringum møguleikum. Ein triðingur av veljarunum sat heima – og nógv skrivaðu "nei" á atkvøðuseðilin fyri at undirstrika sína frustatión.

– Taparin gjørdist Føroya fólk, og tí sita vit her í dag – seksti ár seinni og eru ikki liðug at klandrast um, hvussu úrslitið í 1946 skal skiljast.

Løgtingsmaðurin vísti á, at fullveldislandsstýrið var í ferð við at gera sama "brølara", sum hann tók til, fyri fáum árum síðan.

– Meðan stór ósemja var ímillum ríkispartarnar, var ætlanin at skunda eina fólkaatkvøðu ígjøgnum, har 50% av atkvøðunum skuldu roknast sum nóg stór undirtøka fyri at verða avgerandi. 49,9% av fólkinum kundu so vera ónøgd tey næstu seksti árini.

Edmund Joensen helt fyri, at soleiðis ber ikki til at "handla" í politikki.

– Vit kunnu vera ósamd um politisk mál, men vit mugu altíð finna breiðar semjur um spælireglurnar, legði hann aftrat.